# 48 Pages á størsta ungdomsfestivali í Europa

**21.januar kl.22.30 danska tíð skulu føroyski heavy punk rokkararnir úr bólkinum 48 Pages seta fót á pallin í "Europas Største Ungdoms Festival 2005". Eisini vitja teir eitt studio.**

KONSERT
*tíðindaskriv*



*48 Pages í kuldatunnilsgoymsluni í Fuglafirði*
*Mynd Finnur Justinussen*

### 48 Pages. . . Succes!

48 Pages var uttan iva størsti og mest hart arbeinði bólkurin í 2004.

Bólkurin hevur fullført langt meira, enn hvat vanligi føroyski tónleikarin hevur.

Konsertir hava verið hildnar nærum hvørt vikuskifti, fløgu aktuellir, hópin av fjepparum, egnar t-shirts, dýrar "professjonell-ar" plakatir, stórar konsertferðir og tað seinasta er festivalurin í Danmark og spildurnýggja heimasíðan www.48pages.net. Sum kann sigast er ein "feit" heimasíða, sum øll skuldu nýtt.

### Festivalurin...Gesta tónleikari...

48 Pages fer nú í januar mánaði til Danmarkar at luttaka í "Europas Største Ungdoms Festival 2005", sum fer fram í býnum Aalborg. Yvir 150 bólkar luttaka við í hesum festivali hvørt ár. Og í fleiri ár á rað hava føroyskir bólkar funnið sær vegin við stórari hjálp frá Karl Anton Klein, stjóra á ART "Áhugafelag Rokk Tónleikara".

Á festivalinum hava bólkar millum annað, Di og HTV vitjað. Sum vóru kendu bólkarinir frá Marg-arinfabrikkini í sínari tíð. Festivalurin fer fram í kendu "Aalborg høllini" og er bygdur upp í ca. 7 pallar. Og okkara føroyski bólkur hevur megnað sær at fingið størsta og ein tann mest vælumtókta pallin. Tiltakið byrjar 21.jan kl.18.00 og endar 22.jan á midnátt.

Við hevur bólkurin eitt heitt, feitt og intenst program. Og aftur við hesum kryddra teir tað við at taka pallin við Boga Berg, guitar legendan úr pop bólkinum Speaker, sum er farið aftur um bak.

### Studio

Umframt stóra festivalin, fer bólkurin saman vid leiðara teirra Karl Anton Klein, inn í eitt av teimum vælumtóktu studionum í Århus.

Leingi hevur verið tosað um seriøsar innspælingar. Og hetta fara teir so at royna. Bólkurin hevur fleiri eldri upptøkur m.a. á "Undirgrunds rokk" fløguni Ampaljóð. Og eisini eru tað fleiri heimagjørdar studio-upptøkur, sum kunnu takast niður av heimasíðu teirra www.48pages.net.

Men endamálið hjá bólkinum við at hoppa ein túr yvir til tær dýru mikrofonurnar er eitt sindur ivasamt, men tosað verður um eina fløgu, sum skal økja um føroyskan rokk tónleik og tónleik sum heild.

Tosað verður eisini um bestu føroysku fløguna tú nakrantíd fer hoyra.

### Comeback..

Bólkurin er mannaður vid ungum og evnaríkum tónleikarum. Í eitt ár hava teir hildið saman og tað hevur gingid sterkt. Tó fara tveir av limunum á háskúla nirði í eitt hálvt ár, men teir lova at koma aftur vid fullum "comeback".


STARVSLÝSING

## Verkfrøðingur til vegadeildina

**Við hesum verður søkt eftir avloysara fyri verkfrøðing, sum er í farloyvi, á vegadeildina hjá Landsverki at seta sum skjótast.**

**Rætta fólkinum kunnu vit bjóða eitt spennandi og áhugavert starv, ið er fakliga og persónliga mennandi og við góðum arbeiðsumstøðum.**

**Arbeiðsuppgávur**
Uppgávur, sum viðkomandi í høvuðsheitum kann rokna við at skula røkja og standa fyri:
- Gera ætlanir fyri trygdartiltøk
- Programmeringar, forkanningar, prosjektering og prosjektgransking
- Eftirlit við verkætlanum
- Myndugleikaumboðan

**Førleikakrøv**
Sóknast verður eftir verkfrøðingi ella fólki við aðrari viðkomandi útbúgving og helst við royndum innan omanfyri nevndu virkisøki. Stórur dentur verður lagdur á góðar persónligar eginleikar, og rokna vit við, at viðkomandi er fyrikomandi, hevur góð samstarvsevni, dugir at skipa sítt arbeiðsøki og kann geva sítt íkast til menning av arbeiðsplássinum og er førur fyri at arbeiða sjálvstøðugt, eggja og ganga undan.

**Setanarviðurskifti**
Tænastustaðið verður skrivstovan í Havn. Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsókn við prógvum og lívsgongdarlýsing (CV) verður at senda til:
Landsverk
Postsmoga 78
FO 110 Tórshavn

og skal verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 24. januar 2005. Merkið brævbjálvan "Verkfrøðingur til vegadeildina". Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Heina Eysturoy, virkandi leiðara av vegadeildini, á tel. 31 13 33, teldupostur: he@lv.fo

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 311 333, Faks 314 986, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK byggir land


# Forkanningar av tunnlum og havnum

**Landsverk liggur hevur nógv jørn í eldinum til frama fyri samferðslukervið í Føroyum. Tunnil og havn í Svínoy er eitt teirra**

SAMFERÐSLA
*Snorri Brend*

Hóast búskaparligu útlitini hava verið betri fyri føroyska samfelagið, so darvar tað kortini ikki arbeiðinum hjá Landsverki við at planleggja framtíðar samferðslukervið kring landið.

Í eini nýggjársheilsan frá stjóranum í Landsverki, Oyvindi Brimnes vísir hann á, at teir longu eru farnir undir ymiskar forkanningar av tunnlum kring landið. Her er talan um tunlar í Dali, norður um fjall í Borðoynni og í Leirvík, har forkanningarnar longu eru gjørdar, meðan ein er byrjaður uppá forkanningarnar av tunli og havn úti í Svínoy. Í Mykinesi og í Skúvoy er Landsverk við at vera liðugt við forkanningunum av lendingunum á hesum báðum útoyggjunum.

Víst verður á, at havnin í Vági er liðug, og tann í Nólsoy er um at vera liðug, eins og Landsverk hevur staðið fyri gerð av samferðsluhavnini á Trongisvágsfirði og á Syðradali á Kalsoynni.

Annars kann envnast, at Landsverk hevur verið byggiharri á nýggja bygninginum hjá Landssjúkrahúsinum, sum er tikin í nýtslu. Tey eru í løtuni við at staðfesta,hvussu ein íløga í flogvøllin í Vágum kann gerast best møguligt, sæð í mun til onnur pláss.

**sb**

Sosialurin
www.sosialurin.fo